Færø Amts Hospital flutt úr Lágabø

Hóast Tórshavnar Skipasmiðja skal brúka økið, verður Gamla Hospital varðveitt sum savn

Seinastu tíðina hevur verið arbeitt við at flyta Gamla Hospital í Lágabø í Havn, so hesi søguligu hús ikki skulu dvína fyri útbygging hjá Tórshavnar Skipasmiðju.

Gamla Hospital varð bygt sum Færø Amts Hospital í 1829. Johan Evensen, spinnarin, keypti hospitalið, tá flutt var í nýggja Alexandrines Hospital í 1924, og hava húsini verið nýtt sum bústaður síðani.

Tá skipasmiðjan bygdi út seinast í sjeytiárunum, keypti skipasmiðjan part av Gamla Hospitali - og tryggjaði sær samstundis rættin at keypa restina av ognini.

Og tá skipasmiðjan fyri nøkrum árum síðani keypti ognina, tryggjaðu arvingarnir sær — yvir fyri Tórshavnar Skipasmiðju, at ognin ikki varð beind burtur.

Tí varð farið undir at fyrireika flyting av húsunum. Tá hetta arbeiðið varð farið í gongd, vísti tað seg, at Føroya Sjúkrasystrafelag, Læknafelag Føroya og Formminnisfelagið eisini arbeiddu við eini varðveitingarætlan. Hesi gingu tí saman við fyrrverandi eigarunum og stovnaðu grunn við endamálið at varðveita Gamla Hospital.


Tórshavna Kommuna lat hesum fyrireikarum leiguøki oman fyri Müllers Pakkhús, har húsini nú verða flutt. Gomlu eigararnir eru seinni koyrdir úr grunninum, og eru tað tí tey trý feløgini, sum standa fyri flytingini í dag.

Ætlanin er nýta húsini sum savn.



Norðasti endin á Gamla Hospitali er nú settur á nýggju grundina í Sigmundargøtu, har ætlanin er at varðveita søguligu húsini sum hospitalssavn

Mynd: Álvur Haraldsen



Kunningardiskurin á flogvøllinum í Vágum

Tax Free skipanin føroysk

Frá at vera svensk er nú Tax Free skipanin vorðin føroysk. Tað er Flogfelag Føroya sum nú tekur sær av føroysku Tax Free skipanini

ÓLAVUR Í BEITI

Í góðum samstarvi við Kunningardiskin á Flogvøllinum er nú føroyska Tax Free skipanin farin at virka. Herfyri yvirtók Flogfelagið Tax Free skipanina, sum hevur verið svensk, og nú verður alt avgreitt í Føroyum.

Tá ið ferðamaðurin hevur keypt í Føroyum fyri meiri enn 300 krónur, fær hann ein kekk frá handlinum, hann hevur keypt úr, og á Kunningardiskinum á Flogvøllinum, letur ferðamaðurin so kekkin inn og fær síðan endurgjaldið í hondina. So einføld er skipanin nú.

Norrøna við

Men tað er ikki bert á Kunningardiskinum á flogvøllinum, at ferðamaðurin fær sítt endurgjald, tí sama er galdandi umborð á Norrønu. Og sjálvandi eisini á skrivstovunum hjá Flogfelagnum er gjørligt at fáa Tax Free peningin aftur.

Uni Danielsen, stjóri í Flogfelagnum, letur væl at skipanini, og hann fegnast eisini um góða samstarvið við Kunningardiskin á Flogvøllinum. Hann dylur ikki fyri, at síðan Kunningardiskurin fór á privatar hendur, er munandi betur samstarv fingið í lag.

CANAL DIGITAL
Digitalar -parabolskipanir
Heimin inn í stovuna
Tilboð
1 metur parabolur og Humax digitalur móttakari v/LNB bert.
3.685,-
Ynskir tú bara móttakaran bert.
2.495,-
Tilboðið er bert galdandi um tú teknar teg sum haldara hjá Canal Entertain ella Canal+
Við keyp av hesi digitalu Humax parabolskipanini fært tú hendan frálíka møguleika at siggja allar hesar rásirnar
Canal Local
DR1 sendir góðar dokumentar- og barnasendingar, filmir og undirhald.
Her verður gravadjupan í tíðindum, eksperimenterandi SV, og temaum.
Dansk familjurás við barnasendingum, dokumentar- og undirhaldi.
Svensk rás við undirhaldi, spælfilmum, SV film- og ráðsendingum.
ÓKEYPIS
Canal Entertain
PRIME
Ensk rás við leikum, undirhaldi og tíðindum.
20 digitalar tónleikarásir, fyri øll, allan sólarringin.
Bleytir ástartílmir, røðir, samrøður og striptease.
travel
Sendingar til øll ferðafólk um fjarðskotin ferðamál.
Heimsins besta tónleikarás við tí nýggjasta tónleiknum.
Systurrás hjá MTV. Blandingur av nýggjum tónleiki.
CNN INTERNATIONAL
Beinl. tíðindi úr øllum heiminum allan sólarringin.
Discovery CHANNEL
Rásin fyri tey ævintýrhugaðu í øllum aldri.
Animal Planet
Tí øll sum elska djór og djórasendingar.
NATIONAL GEOGRAPHIC CHANNEL
Ransóknarferðir, náttúru- og ævnfyrsendingar.
HALLMARK
Undirhaldsrás við smáræðum og SV filmum.
Filmsrás við einum úrvali av størstu klassikarunum.
Heimskend tíðindarás við handils- og vinnutíðindum.
Teknifilmur, skemtitekir og undirhald fyri børn úr 4 árum.
CARTOON NETWORK
Flintstones, Tom & Jerry og øll hini kendu.
KIOSK
Á KIOSK kanst tú hyggja at filmi tá tær lystir. Formet 1 og øðrum stórum frøttar- og konserthendingum. Er treyt er, at tú heldur CANAL+ ella Canal Entertain. Er bert galdandi við NOKIA móttakarum, sum vit hava á lagri.
Rás við tónleiki úr 60'unum, 70'unum og 80'unum
104,- um mánaðan
CNBC
Altjóða figgjar- og vinnutíðindi og frásagnir.
Digitalt tilboð
Spar kr. 49,- um mánaðan
Tekna teg sum haldara av Canal Entertain og Canal+ fyri einans
222,-
um mánaðan
CANAL+
CANAL+ GUL - CANAL+ BLÁ
Nýggjastu topp filmirnir allan sólarringin, umframt beinleiðis enskan og týskan fótbólt.
159,- um mánaðan
Canal Select
Rásin, sum vísir tað besta frá norsku rásunum hjá NRK
92,- um mánaðan
Finsk public-servise rás.
76,- um mánaðan
Ósensureraðir erotiskir filmir hvørja nátt. Krevst at halda Canal Entertain ella CANAL+
55,- um mánaðan
RADIOHANDILIN
N. Finsensgøta 16
110 Tórshavn
Tel 31 82 77
GF Elektronik
Birnugøta 31
100-Tórshavn
Tel 31 02 54
AP- Radio
700-Klaksvík
Tel 45 64 50
Fart. 21 64 50
Ordramóttøka kl. 12-14
TERA
600 Saltangará
Tel 44 88 88
RADIOSERVICE
900-Vágur
Tel 37 35 00
Fart.21 35 00
SØRVÁGS RADIOHANDIL
380-Sørvágur
Tel 33 26 14